

Mong eru bløðini,
men BLAÐIÐ er eittans ...

Ja eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 400 krónur ársfjórðingin

Samstundis eri eg við í lutakastinum um eina ferð frá

ATLANTIC AIRWAYS

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Sosialurin

# ítróttur

Nr. 191 • leygardagur • 5. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur**
**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 05.10 | EB/S-GÍ | Páll Augustinussen |
| 05.10 | TB-HB | Birgir Sondum |
| 05.10 | B68-Skála | Jens Petur Brattalíð |
| 05.10 | KÍ-NSÍ | Niklas á Líðarenda |
| 05.10 | B36-VB | Lassin Isaksen |

**Upp- og niðurflytingardystir**
**2./3. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 05.10 | B68-NSÍ | Hans F. Hansen |

**3./4. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 05.10 | EB/S-B71 | Jákup M. Kjeld |

**Hondbóltur**
**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 05.10 | 16.00 | H71-Tjaldur |
| 06.10 | 16.00 | Kyndil-StÍF |
| 06.10 | 16.00 | KÍF-Neistin |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 06.10 | 14.30 | Kyndil-StÍF |
| 06.10 | 15.00 | Stjørnan-Neistin |
| 06.10 | 15.00 | VB-Tjaldur |

EB/Streymur-GÍ:Eiðismøl:

## Europa ella niðurflytingardystur

**Fyritreytirnar hjá EB/Streymi og GÍ eru sera ymiskar á Eiðismøl í dag, tí meðan EB/Streymur vil tryggja seg í 1. deild, vil GÍ varðveita sín InterToto Cup-kjans.**

UPPTAKT
*Hilmar Jan Hansen*

— Samstundis sum vit fara at gera okkara besta, vóna vit sjálvandi at fáa eina hjálpandi hond frá toftamonnum, ið bara ikki mugu tapa móti Skála.

Tað sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá EB/-Streymi, ið hevur neyvan teir stóru trupulleikarnar av at seta sínar menn upp til dagsins dyst móti GÍ.

Tað var júst EB/Streymur, sum í fjør bremsaði sigursgongdini hjá GÍ, tá sundalagsmenn á heimavøllinum á Eiði fingu javnleik móti gøtumonnum. Og í dag vóna teir at fáa í minsta lagi tað sama burturúr:

— Best fyri okkum er at vinna dystin, tí so hava vit ikki fyri neyðini at hugsa um, hvussu tað spælir av á Toftum, men vit vita samstundis at GÍ sjálvandi fer at gera tað torført fyri okkum, sigur venjarin hjá EB/-Streymi.

Higartil hevur EB/-Streymur á heimavøllinum vunnið á HB, TB og Skála, og fingið javnleikir móti bæði B36 og B68, so tað krevst eitt sindur av GÍ, skal fjórðaplássið varðveitast.

Einasti spælarin, ið ikki er tøkur hjá sundalagsmonnum í dag, er Sorin Anghel, tí hann hevur karantenu eftir gula kortið í HB-dystinum. Heldur ikki gera nakrir skaðar fyrireikingarnar truplar.

### Magni og Suni uttanfyri

GÍ, sum við sínum fjórðaplássi hevur annan fótin úti í Europa, hevur bæði Magna Jarnskor og Suna Olsen uttanfyri, tí teir hava karantenu. Men hinvegin er Bartal Eliasen tøkur aftur eftir karantenu, og Pól Ennigarð sær út til at vera komin fyri seg eftir skaða.

— Sjálvandi fer GÍ eftir øllum trimum stigunum. Nú hevur felagið í so mong ár á rað verið við í europeisku kappingunum, og tað er eisini tað minsta, ið kann fáast burtur úr hesa ferð, sigur Suni Olsen, ið altso bara verður áskoðari á Eiðismøl í dag.



*Tað var júst EB/Streymur, sum í fjør bremsaði sigursgongdini hjá GÍ, tá sundalagsmenn á heimavøllinum á Eiði fingu javnleik móti gøtumonnum*

Undan dystinum er GÍ nummar fýra við sama stigatali sum B36, ið er nummar fimm. Tí krevst av GÍ, at dysturin verður vunnin, skal kjansurin fyri Europa næsta ár ikki bresta á málstrikuni.

Hetta er eisini síðsti dysturin hjá venjaranum Johan Nielsen, sum tilsamans í ellivu ár hevur staðið á odda fyri GÍ, ið óivað vil løna honum fyri trúgva tænastu við einum allarsíðsta sigri.

B68-Skála:

## Skálamenn skulu vinna

**Bara ein sigur á Toftum kann sleppa Skála undan at skula spæla upp- og niðurflytingardyst móti B71 — og samstundis skulu sundalagsmenn heldur ikki fáa meira enn javnleik í sínum dysti.**

UPPTAKT
*Hilmar Jan Hansen*

Tað eru tvey lið, ið hava havt tað gott síðstu vikuna, sum møtast á Svangaskarði í dag. B68 vann traditionellu grannauppgerðina móti NSÍ, og Skála snøgt sagt sópaði TB av vøllinum í botnuppgerðini sunnudagin.

Kortini er nógv meira álvari aftan fyri manningina hjá Skála, sum í dag hevur allarsíðsta møguleikan at sleppa sær undan dysti móti B71 um framhaldandi tilveru í 1. deild, meðan B68 hvørki fer ein ella annan veg, sama hvussu úrslitið verður.

— Vit mugu bara vóna, at tað sæst aftur á avrikinum hjá toftamonnum, at teir sum so einki hava at spæla fyri, sigur Jonhard Frederiksberg, sum við trimum málum og onkrum uppleggi aftrat var stóri skarprættarin hjá Skála í 8-0 sigrinum móti TB.

— Tað er sjálvandi ikki tað sama hjá okkum at spæla móti B68, sum tað var móti TB, tí tann dystin var mótstøðan satt at siga ikki tann stóra. Men hóast tað verður torført, fara vit at royna okkara besta.

Støðan hjá Skála er tann, at ein sigur má til, um tað skal bera til at fáa EB/-Streym aftur. Men samstundis má EB/Streymur heldur ikki fáa meira enn javnleik, skal tað eydnast Skála at sleppa av næstaftasta plássinum.

Liðið hjá skálamonnum er stórt sæð tað sama sum í dystinum fyri viku síðani. Einasti, av spælarunum, ið ikki er við, er Dánial Hansen, sum er skaddur, men hann hevur heldur ikki verið við í síðstuni.

### Skála fær einki í gávu

Hóast Jonhard Frederiksberg hevur loyvi at vóna, at B68 ikki leggur so nógv í dystin, so skal hann ikki vænta sær nakra hjálp frá toftamonnum, ið hava havt vind í seglunum síðstu dystirnar.

— Nú fingu vit aftur gongd á móti endanum, og hóast tað ikki broytir støðuna hjá okkum á stigatalvuni, fara vit sjálvandi at gera okkara besta á heimavølli í síðsta dystinum hjá okkum, sigur Ingolf Petersen, sum saman við Kjartan Nesá hevur ábyrgdina av B68-liðnum.

Teir báðir hava greitt uppgávuna væl, síðani teir tóku við eftir tapið í Gøtu, tí bæði móti VB heima og NSÍ úti hevur B68 fingið fulla úrtøku — enntá við einum manni í minniluta part av dystinum.

Fríðin Ziskason, sum varð vístur út móti VB, er aftur við í dag, men í staðin er tað hesa ferð Messias Perreira, ið noyðist at njóta dystin sum áskoðari eftir reyða kortið, hann fekk í Runavík.

Annars eru allir mans tøkir hjá B68, sum á útivølli á Skála vann 2-1 í fyrra landskappingardystinum teirra millum.